# Ritstjórnarskifti

Tvey nøvn hava staðið á tittulblaðnum á Fróðskaparriti síðan 1952, tá ritið kom út á fyrsta sinni, men tey eru horvin á hesi 26. bók av Fróðskaparriti. Tað eru nøvnini Hans Debes Joensen og Jóannes Rasmussen. Teir hava sitið sum ritstjórar á ritinum og sum nevndarlimir í 25 ár, tey ár sum Fróðskaparrit og Føroya Fróðskaparfelag hava verið til.

Á aðalfundi felagsins 17. desember 1977 tóku teir seg burtur úr felagsnevndini og samstundis søgdu teir frá sær ritstjórastarvið. Saman við teimum hevur Sverri Dahl, landsantikvarur, sitið sum nevndarlimur øll hesi árini; hann hevur ikki verið ritstjóri, men tess meira hevur hann skrivað í ritið. Eisini hann segði seg úr nevndini. Hóast nógv varð strongt á, vildi eingin av teimum lata seg velja aftur. Teir hildu 25 ár vera nóg mikið.

Tey fyrstu 10 árini sótu Hans Debes Joensen og Jóannes Rasmussen einsamallir sum ritstjórar, men í 1962 kom Jóhannes av Skarði, orðabókamaður og lærari, afturat. Hann fór úr ritstjórnini í 1973, og í hansara stað kom Jóhan Hendrik W. Poulsen, sum enn situr í ritstjórnini.

Í 1965 fekk meginhugskot teirra hold, tí tá varð Fróðskaparsetur Føroya sett á stovn. Nú fer fram hægri undirvísing innan føroyskt mál og bókmentir, náttúruvísindagreinir og gudfrøði. Ikki ber til at taka embætisprógv, men prógvini við Fróðskaparsetrið eru góðkend sum partur av lesnaði við universitet í Norðurlondum.

Tað er óneyðugt at siga føroyingum frá, hvørjir hesir undangongumenninir í fróðskapi eru, tí teir hava báðir fleiri onnur almenn álitisstørv umframt dagliga virki sítt.

Hans Debes Joensen er føddur 27. 11. 1913 á Tvøroyri. Hann tók studentsprógv í 1932 og fór at lesa læknafrøði. Hann varð lækni í 1939. Embætislæknaprógv tók hann í 1942. Í nøkur ár starvaðist hann sum lækni í Føroyum og Danmark til hann í 1949 gjørdist landslækni í Føroyum, og tað er hann enn.

Hans Debes Joensen hevur verið formaður í Føroya Fróðskaparfelag í 1952-1974 og næstformaður 1974—1977. Hann hevur verið næstformaður í setursráðnum 1965—1974 og formaður 1974—1977. Hóast eitt sera krevjandi starv, hevur Hans Debes Joensen skrivað fleiri læknafrøðiligar ritgerðir, m. a. doktararitgerð í 1954. Hann hevur eisini skrivað Alisfrøði, sum hann fekk M. A. Jacobsens heiðurslønina fyri í 1969. Umframt granskingarverk sítt í læknafrøði og alisfrøði hevur hann fingið nógv á skaftið í frøðiorðagerð og týðing av skaldskapi. Hann hevur m. a. týtt kinverskar yrkingar til føroyskt.

Jóannes Rasmussen er føddur 29. 2. 1912 í Tórshavn. Hann hevði upprunaliga skrivstovuútbúgving, men tók studentsprógv í 1937. Aftan á studentsprógv starvaðist hann, samstundis sum hann las við universitetið í Keypmannahavn, á Danmarks Geologiske Undersøgelser. Her fekk hann eisini starv sum jarðfrøðingur, tá hann í 1950 gjørdist mag. scient., fyrst sum vísindaligur hjálparmaður og frá 1953 sum deildarjarðfrøðingur. Síðan 1955 hevur hann harumframt verið fyristøðumaður fyri Føroya Náttúrugripasavni. Síðani 1971 hevur hann verið statsjarðfrøðingur (statsgeolog).

Jóannes Rasmussen hevur verið næstformaður í Føroya Fróðskaparfelag 1952—1974 og formaður 1974—1977. Hann hevur verið formaður í setursráðnum 1965—1974 og næstformaður 1974—1977.

Jóannes Rasmussen er høvundur at fleiri ritgerðum og greinum um føroyska jarðfrøði. Í ár varð hann kosin til heiðursdoktara við universitetið í Keypmannahavn.

Í nýggju nevnd Føroya Fróðskaparfelags vórðu á aðalfundi 17. desember 1978 valdir: Høgni Debes Joensen, lækni, Jóhan

Hendrik W. Poulsen, málfrøðingur og Jóan Pauli Joensen, fólkalívsfrøðingur. Nevndin hevur skipað seg soleiðis: Høgni Debes Joensen, formaður, Jóan Pauli Joensen, næstformaður og Jóhan Hendrik W. Poulsen, kassameistari. Allir tríggir sita sum ritstjórar á Fróðskaparriti.

Nýggja nevndin ber fráfarandi nevnd sína bestu tøkk fyri, at teir hava lynt so væl undir hana; eisini vil hon nýta høvi at takka Mentunargrunni Føroya løgtings, sum so trúliga hevur borið Fróðskaparrit uppi hesi 25 árini. Vit vóna at fáa eins gott samstarv við grunnin, sum fráfarna nevndin hevur havt.

*Ritstjórnin.*

## Change of Editorship

Two names which have appeared on the title page of Fróðskaparrit since its inception in 1952 are missing from this 26th Volume: Hans Debes Joensen and Jóannes Rasmussen. They have served as editors of the journal and as committee-members for all the 25 years that Fróðskaparrit and the Føroya Fróðskaparfelag have been in existence.

In the general meeting of the Fróðskaparfelag on 17 December, 1977, they stepped down from the committee, and, at the same time, retired from editorship. Sverri Dahl, our National Antiquary, served with them as a fellow committee-member during all those years. He was not an editor, but he wrote all the more for the journal. Sverri Dahl also stepped down from the committee. Although pressed to do so, none of the three would stand for re-election. They felt that a term of 25 years was long enough.

For the first ten years Hans Debes Joensen and Jóannes Rasmussen served alone as editors, then, in 1962, they were joined by Jóhannes av Skarði, lexicographer and teacher. He retired from editorship in 1973 and his place was taken by

Jóhan Hendrik W. Poulsen who continues to serve as an editor.

In 1965 their master plan was realized when the Fróðskaparsetur Føroya (Faroese Academy) was founded. At present advanced instruction in the Faroese language and literature, science and theology is available. It is not yet possible to receive a final degree, but the examination courses of the Fróðskaparsetur are recognized as part of the study requirements for Scandinavian universities.

It is unnecessary to introduce to Faroese people these pioneers in scholarship as they have both held many important public positions outside their daily activities.

Hans Debes Joensen was born on 27. 11. 1913 in Tvøroyri. After taking his leaving certificate in 1932, he began his medical studies. He became a physician in 1939 and took the state medical examination in 1942. He worked as a doctor in the Faroes and in Denmark until, in 1949, he was appointed Chief Medical Officer of the Faroes, the position which he still holds.

Hans Debes Joensen served as chairman of the Føroya Fróðskaparfelag from 1952—1974 and as vice-chairman from 1974—1977. He was vice-chairman of the board of the Academy from 1965—1974 and chairman from 1974—1977. In spite of holding an extremely demanding position, Hans Debes Joensen has written numerous medical treatises, among others a doctoral dissertation in 1954. He is also the author of *Alisfrøði* (Physics) which won the M. A. Jacobsen Award for 1969. In addition to his medical and scientific achievements Hans Debes Joensen has also worked in the fields of lexicography and *belles-lettres.* He has recently published Faroese translations of Chinese poetry.

Jóannes Rasmussen was born on 29. 2. 1912 in Tórshavn. Originally trained as a clerk, he took his leaving certificate in 1937. During his undergraduate years at Copenhagen University, he worked at the Danish Geological Survey. Here, in the Faroes, he also worked as a geologist after receiving his *mag.*

*scient.* degree in 1950; first, as a scientific assistant and subsequently as chief geologist. From 1955 to the present he has been director of the Føroya Náttúrugripasavn and from 1971 he has served as a State Geologist.

Jóannes Rasmussen was vice-chairman of the Føroya Fróðskaparfelag from 1952—1974 and chairman from 1974—1977. He served as chairman of the board of the Academy from 1965—1974 and as vice-chairman from 1974—1977.

Jóannes Rasmussen is the author of many treatises and articles on the geology of the Faroes. This year he was made a Doctor *(honoris causa)* of the University of Copenhagen.

At the general meeting of 17 December, 1978, the following were elected to the new committee of the Føroya Fróðskaparfelag: Høgni Debes Joensen, medical specialist; Jóhan Hendrik W. Poulsen, philologist; Jóan Pauli Joensen, ethnologist. The committee recognizes Høgni Debes Joensen as its chairman, Jóan Pauli Joensen as vice-chairman and Jóhan Hendrik W. Poulsen as treasurer. All will serve as editors to Fróðskaparrit.

The new committee extends its sincere gratitude to the members of the out-going committee for having so well prepared the way. Also, they would like to take the present opportunity to thank the Mentunargrunnur (Cultural Foundation) of the Faroese Parliament which has so faithfully supported Fróðskaparrit over the past 25 years. We look forward to as productive a working relationship with the Cultural Foundation as was enjoyed by our predecessors.

*The Editors.*